# Andrew í bíðistøðu

**HB- og landsliðsleikarin bíðar í løtuni eftir, hvørjum útspælið Fremad Amager er fer at koma við**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru nú úti við ein mánaður síðani, at Andrew av Fløtum fór til Danmarkar at royna seg hjá Fremad Amager. Hetta er felagið, sum í heyst gjørdi sáttmála við Jann Inga Petersen úr B68, og nú røkist so kanska fyri, at enn ein føroyskur landsliðsleikari verður at síggja á liðnum.

- Nú er vetrarsteðgurin komin hjá liðnum, so í løtuni gangi eg einamest og bíði. Eg vandi tó við liðnum í einar tríggjar vikur, og samanumtikið haldi eg sjálvur, at hetta mundi ganga á góðari leið. Vit hava so avtalað, at vit skulu tosa saman aftur, og koma teir við einum hampuliga góðum tilboði, so rokni eg við, at eg taki av, sigur Andrew av Fløtum.

Spurdur um støðið í felagnum, heldur Andrew, at tað á ongan hátt er ræðandi.

- Sjálvandi er tað munur á, tá tú hvønn dag spælir á grasi, men sjálvur haldi eg so ikki, at talan er um eitt lið, sum langt omanfyri tey bestu føroysku liðini. Tvørtur ímóti rokni eg við, at sterkastu liðini í heimligu kappingini uttan stórvegis trupulleikar høvdu staðið seg í deildini.

Hetta seinasta kundi kanska bent tann vegin, at ikki er so øgiliga áhugavert hjá einum føroyskum leikara at skifta til lið í donsku 1. deild, men hesum er Andrew tó ósamdur í.

- Tað snýr seg eins nógv um, at tú her niðri hevur størri møguleika at gera vart við teg. Fyri tað um tú spælir væl í føroysku landskappingini, er ikki víst, at nakar uttan fyri Føroyar leggur tað til merkis. Her eru sannlíkindini fyri tí í øllum førum størri, og so veit mann ikki, hvat kann spyrjast burturúr.

Her heima hevur nakað verið tosað um, at ein leikari sum Andrew í løtuni gongur uttan sáttmála. Fleiri onnur feløg enn HB eru sett í samband við hann, men sjálvur tykist leikarin ikki hugsa stórvegis um hetta.

- Nú skalt tú aldrin siga aldrin, men sjálvur rokni eg við, at fari eg aftur til Føroyar at spæla, so verður tað sum HB'ari. Tað er í øllum førum soleiðis, eg kenni meg, og tað er ikki nakað, sum broytast soleiðis uttan víðari, sigur hann at enda.



*Kemur Fremad Amager við einum hampuliga góðum tilboði, so roknar Andrew av Fløtum fyri vist, at hann fer at taka av*

# HB-venjarin er ávegis

**Fyrrverandi VB-venjarin, Dragan Kovacevic, kemur til Føroya í vikuni, og fríggjadagin skal hann fyri fyrstu ferð royna at venja HB-leikararnar**

HB-VENJARIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt av feløgunum í bestu fótbóltsdeildini, sum enn ikki hevur sett venjara til komandi kappingarár, er HB.

Sum tvífaldur meistari og komandi 100-ára føðingardagsbarn, vóru tað annars mong, sum roknaðu við, at hetta var ein lutur, sum reyð/svarta høvuðsstaðarliðið fór at loysa alt fyri eitt, men enn tykist leiðslan í felangum ikki hava skundað sær alt ov nógv í so máta.

Heldur hevur denturin verið lagdur á at tryggja sær leikarahópin, sum hevur vunnið gullið til høldar tey bæði seinnu árini, og í so máta er komið heilt langt. Enn resta undirskriftirnar hjá trimum leikarum, men í øllum hesum førunum er tó felags, at tað man vera ivasamt, um leikararnir eru í landinum til ta tíð. Teir tríggir eru Tór-Ingar Akselsen, sum møguliga fer til Noregs komandi ár, Andrew av Fløtum, sum í løtuni bíðar eftir danska Fremad Amager og so Jan Christian Dam, sum í løtuni er í Danmark, og annars ivast í, um talan yvir høvur verður um fótbólt í fremstu røð aftur. Og at felagið so eisini hevur fingið tilgongd av Jákup á Borg man ikki gera ætlanirar í sigursvanda felagnum minni.

**Ósemja skilti frá VB**

Og nú er so líkt til, at eisini venjaraspurningurin kemur upp á pláss. Í vikuni kemur jugoslaviski Dragan Kovacivic til landið, og eftir ætlan skal hann royna at venja við liðnum komandi fríggjakvøld. Hetta tó sjálvandi treytað av, at neyðugu pappírini eru í lagi.

Hóast tað ikki munnu vera øll, sum bera kenslu á navnið, so hevur Dragan tó áður virkað sum venjari í Føroyum. Fyri tveimum árum síðani var hann venjari hjá VB tey fyrstu sjey umførini, og tó at hann tá varð sekkjaður, so tóktist orsøkin til hetta ikki vera ódugnaskapur ella væntandi førleiki. Einamest mundi trupulleikin vera, at tann politikkurin, sum hann av leiðsluni varð settur at gjøgnumføra, ikki samsvaraði við fatanina, sum leikararnir á besta liðnum høvdu av støðuni, og við teimum grundleggjandi mununum, sum soleiðis vóru, varð samstarvið at enda annulerað.

Vit fingu orðið á HB-formannin, Birgir Enghamar, mánamorgunin, men í verandi støðu vildi hann ikki gera viðmerkingar til tíðindini.

*Smykkuhjørnið*



Sosialurin 341800

Nýggjur smykkuhandil letur upp, í Niels Finsensgøtu 51, mikudagin 19. november kl. 14.00

Stórt úrval av sera vøkrum, etniskum og øðrvísi smykkum

Opið er:
Mán-frí 14.00 - 17.30
Ley 10.00 - 14.00

**Telefon 354900**

# Myndin var tilvildarlig

UMBERING
*Jákup Mørk*

Í fríggjadagsblaðnum her fyri snúði forsíðan á blaðnum seg um útlendingamálið, sum í løtuni er í føroyskum ítrótti.

Í hesum sambandi høvdu vit valt at nýta eina sonevnda myndacollagu við útlendskum leikarum úr fót-, flog- og hondbólti.

Tann myndin er av onkrum uppfata sum um trupulleikar eru við pappírum hjá teimum leikarum, sum vóru á myndini, og skulu vit gera vart við, at tað var tað ikki.

Har skuldi sjálvandi staðið, at talan var um modellmynd, og at eingin av ítróttarfólkunum á myndini var íblandað aktuella málið um útlendskar leikarar.

Hesin teksturin var tó ikki á forsíðuni, og tekur yvirritaði fulla ábyrgd av hesum, og vil eg samtundis biðja lesarar og viðkomandi ítróttarfólkini um umbering fyri mistakið.


Sosialurin

Fútin gjørt húsarannsókn

*Myndacollagan á forsíðuni í fríggjadagsblaðið okkara. Undir myndunum skuldi sjálvandi staðið, at talan var um modellmynd, og at eingin av ítróttarfólkunum á myndini var íblandað aktuella málið um útlendskar leikarar*



# Liðtelving

**Bæði í Føroyum og í Danmark blivu fyrstu umførini leikt um vikuskiftið. Í heimligu kappingini hendi einki stórvegis óvæntað, men í Danmark liggur føroyska talvfelagið á einum flottum deildum triðja plássi eftir fyrstu tvey umførini**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Manningarnar í 1. deild eru áhugaverdar í ár. Eitt nú hava hvalvíkingar fingið Rógva W. Rasmussen í sín part, og ilt er at meta um nakran ávísan favoritt at vinna FM-heitið. Havnarmenn høvdu, hóast teir vunnu, eitt skert lið um vikuskiftið. Ivamál er um hvussu nógv Martin Poulsen verður við teimum í ár. Hann ætlar sær nevnliga at telva nógvar kappingar kring Evropa í næstum.

### Javnt eftir 1. umfar

Allir tríggir dystirnir í 1. deild í føroysku liðkappingini endaðu 2,5 — 1,5.

Í Havnini vunnu verandi føroyameistararnir á toftamonnum. Toftamenn vóru eins og havnarmenn nakað skerdir. Jens Kristian Hansen leikti ikki við sunnudagin, og tí eru toftamenn helst eisini nøgdir við hálvtannað stig. Topptalvið endaði við javnleiki millum Olaf Berg og Boga Ziska.

Torkil Nielsen gjørdi bart við svarta fólkinum móti Ólavi Simonsen. Torført er at vinna á Ólavi, serliga við svarta fólkinum, men Torkil hevur taktisk evnir sum fáur, og vann hann eitt gott talv. Bróður Torkil, Sonnie Nielsen, fekk eisini eitt gott úrslit. Hann hevði fyrimun í endatalvinum móti Rana Nolsøe, men klaksvíkingurin stríddi seg til javnleik. Klaksvíkingar vunnu tó tepran sigur á sandavágsmonnum, við at vinna á triðja og fjórða borði.

Í Kollafirði vann heimaliðið tepran sigur á hvalvíkingum. Hans Kristian Simonsen og nýggi maðurin á hvalvíksliðnum, Rógvi W. Rasmussen, leiktu javnt. Tann støðugi Finnbjørn Zachariassen leikti ikki við í dag á hvalvíksliðnum, og tað kostaði helst eisini sigurin. Einkultúrslit úr øllum dystunum og støðan kann lesast aðrastaðnis í blaðnum í dag.

### 2. deild

Eins og í 1. deild, endaði allir dystirnir í 2. deild við somu siffrum. 3-1 varð felagsúrslitið í 1. umfari. HT2, KT2 og VT vunnu sínir dystir á ávíkavist KTF2, RT og VT2. IM John Rødgaard sum aftur í ár telvar við vestmenningu, telvaði tó ikki hetta vikuskiftið.

### Góð byrjan í donsku 1. deild

Leygardagin tók føroyska talvfelagið í Keypmannahavn fyrsta takið í bestu donsku deildini. Vónirnar vóru góðar undan dystinum móti Nørresundby, sum eru eitt petti lægri styrkismettir enn føroyingarnir.

Tendensurin varð frá fyrsta leiki góður. Telvararnir á føroyska liðnum løgdu væl út, nærum allir høvdu tamarhald og fyrimunir í talvunum, og skjótt skolaðu stigini inn. Norski stórmeistarin á liðnum Einar Gausel hevði tó eina heldur keðiliga støðu, og valdi at taka av javnleikstilboðnum. Tá roykurin hevði lagt seg, hevði føroyska liðið leikt seg til ein góðan 5,5 — 2,5 sigur. IM Nikolaj Borge, John Arni Nilssen, Flóvin Tór Næs og Carl Eli Nolsøe Samuelsen vunnu, meðan GM Gausel, Heini Olsen og Heini Danielsen leiktu javnt. Eyðun Nolsøe tapti tíverri eftir ein avgerandi feil í einari annars vinnandi støðu.

Sunnudagin varð mótstøðuliðið SK 68 úr Århus, sum er eitt javntsterkt lið samanborið við tað føroyska. Úrslitið gjørdist 4-4. Einar Gausel, Heini Olsen og Carl Eli Nolsøe Samuelsen vunnu síni talv, meðan John Arni Nilssen og Heini Danielsen leiktu javnt.

Alt í alt tvey góð úrslit um vikuskiftið, sum viðførir eitt deilt triðja pláss við 9 1/2 stigum av 16 møguligum í fremstu donsku deildini. Triðja umfar verður 7. desembur, og tá hittur føroyska felagið danmarksmeistarunum seinastu trý árini, Helsinge. Fylgið við á www.dsu.dk/division/div42/divi42.htm

### 1. deild, 1. umfar

| | | |
|---|---|---|
| ST | KTF | 1,5-2,5 |
| Torkil Nielsen | Ólavur Simonsen | 1-0 |
| Sonni Nielsen | Rani Nolsøe | 0,5-0,5 |
| Jónfinn Thomsen | Tummas M. Anthoniussen | 0-1 |
| Gutti Petersen | Ingolf Gaard | 0-1 |
| HT | TT | 2,5-1,5 |
| Olaf Berg | Bogi Ziska | 0,5-0,5 |
| Herluf Hansen | Wensil Højgaard | 1-0 |
| Jógvan Joensen | Helgi Joensen | 0-1 |
| Óli Joensen | Justinus Hansen | 1-0 |
| KT | TFS | 2,5-1,5 |
| Hans Kristian Simonsen | Rógvi W. Rasmussen | 0,5-0,5 |
| Torbjørn Thomsen | Martin Brekká | 1-0 |
| Eyðálvur Johannesen | Sámal Christiansen | 1-0 |
| Grettir Djurhuus | Gunnar Joensen | 0-1 |

### Støðan 1. deild

| | |
|---|---|
| 1. KTF | 2,5 |
| 2. HT | 2,5 |
| 3. KT | 2,5 |
| 4. ST | 1,5 |
| 5. TT | 1,5 |
| 6. TFS | 1,5 |

### 2. deild - úrslit

| | | |
|---|---|---|
| KTF2 | HT2 | 1-3 |
| RT | KT2 | 1-3 |
| VT | VT2 | 3-1 |

### Støðan 2. deild

| | |
|---|---|
| 1. VT | 3 |
| 2. KT2 | 3 |
| 3. HT2 | 3 |
| 4. VT2 | 1 |
| 5. RT | 1 |
| 6. KTF2 | 1 |

# Kasparov vs X3D Fritz

Heimsins mætasti telvari, Garry Kasparov, 40, hevur enn einaferð valt at bjóða sterkasta talvforritinum í heiminum av. Kasparov sigur sjálvur, at hann kennir tað sum hansara uppgávu og skyldu, sum sterkasti telvari í heiminum, at verja mannaættina móti tí alsamst skjótu og vælútvikladu tøknini. Ein rættilig stór byrða at bera á herðum sínum, men somuleiðis eisini ein djørv og umráðandi avgerð hjá Kasparov fyri okkum onnur sum fylgja við í spenningi.

Seinast hann leikti móti telduni var í januar mánaða. Tann dysturin endaði 3-3. Kasparov hevur sum sagt aftur valt at taka avbjóðingina upp, í einum dysti, ið fevnir um fýra talv. Í skrivandi løtu er triðja talvið, sum bleiv leikt sunnukvøldið, júst liðugt. Lat okkum fara aftur til fyrsta talvið: Kasparov fekk ein fyrimun við hvíta fólkinum, men Fritz vardi væl og fekk eitt kontraálop sum gav ævigt skák, og harvið javnleik. Í seinna talvinum leikti Kasparov heldur ótraditionelt við svarta fólkinum, fekk javnað út, fyri síðani at leika ein avgerandi feil í miðspælinum. Leikar tú bara ein evarska lítlan feil móti Fritz, tapur tú við 100% vissu.

Kasparov hevur eina mentala styrki, sum er ólík nøkrum øðrum. Hann kemur altíð aftur. Og sunnudagin vann hann eitt einastandandi flott talv, sum tit síggja niðanfyri. Kasparov leikti stillisliga seg til sigurs. Fritz kundi einki gera. Støðan er tískil 1,5 — 1,5 undan seinasta talvinum í dystinum, sum verður leikt í dag, týsdagin 18. novembur.
Her er talvið.

**Kasparov,G (2830) - X3D FRITZ**
X3D Match New York USA (3), 16.11.2003

**1.Rif3 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 d5 4.d4 c6 5.e3 a6 6.c5** (Áhugavert. Tað hevur víst seg at slíkar finnuuppstillingar eru optimalar ímóti teldum) **6...Ribd7 7.b4 a5 8.b5 e5 9.Fa4 Fc7 10.Ba3 e4 11.Rid2 Be7 12.b6 Fd8 13.h3 0—0 14.Rib3 Bd6** (Ein skuldi trúð at teldan hevur humor! Um Kasparov tekur bispin, verður frúgvin fangað við Rixb6) **15.Rb1 Be7** (Hvat var endamálið við Bd6..?) **16.Rixa5 Rib8 17.Bb4 Fd7 18.Rb2 Fe6 19.Fd1** (Kasparov hevur nú eina gjølla ætlan. Næstu mongu leikirnir eru djúpir og helst eisini avgerandi. Svartur hevur og fær einki mótspæl) **19...Rifd7 20.a3 Fh6 21.Rib3 Bh4 22.Fd2 Rif6 23.Kd1!** (Kongur skal yvir í hitt borðið) **Be6 24.Kc1 Rd8 25.Rc2 Ribd7 26.Kb2 Rif8 27.a4 Rig6 28.a5 Rie7 29.a6!** (Fyri at koma víðari. Støðan er í forvegin læst, upp má loysast) **29...bxa6 30.Ria5 Rdb8 31.g3 Bg5 32.Bg2 Fg6 33.Ka1 Kh8 34.Ria2 Bd7 35.Bc3** (Kasparov flytur fólkið sítt til tey optimalu plássini) **35...Rie8 36.Rib4 Kg8 37.Rb1 Bc8 38.Ra2 Bh6 39.Bf1** (a6 finnan livur ikki leingi aftrat) **39...Fe6 40.Fd1** (Tíðarneyðin yvirstaðin, og støðan vunnin) **40...Rif6 41.Fa4 Bb7 42.Rixb7! Rxb7 43.Rixa6 Fd7 44.Fc2 Kh8** (Týpiskur telduleikur. Tá hon ikki veit hvussu hon kann betra um støðuna, flytur hon onkuntíð meiningsleysar leikir) **45.Rb3**




Endalig støðumynd

Fritz gavst. Kasparov hevur finnu meir, fær a-linjuna eftir Rba3, Rib4, og svartur tapur spakuliga **1—0**

www.smyril-line.fo




**Í SAMBAND VIÐ**, at miðað verður ímóti fyrsta floks undirhaldi umborð á Norrönu fyri summarið 2004, so fara vit við hesi lýsing at heita á tónleikabólkar, stórar sum smáar, yngri sum eldri og innan øll tónleikasløg at gera vart við seg sum skjótast, so møguligt samstarv kann fáast í lag. Somuleiðis verður lýst eftir plátuvendarum, skemtarum og undirhaldarum í breiðastu merking at undirhalda børnum og/ella vaksnum.



Áhugaði biðjast venda sær til Rúnu á Heygum á **telefon 34 59 00** – ella umvegis teldupost á: **runah@smyril-line.fo**

J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo